Útoyggjablaðið
# GLÓÐIN
Nr. 7 2. ársfjórðingur 2005
48,- kr.
ISSN 1602-5652

## Fullir heygsmenn fangaðir í Stóra Dímun

## Vanlukku kommunusamanlegging

## Hon tók kampin upp, og bygdi eitt hotel



Sanna Silvurstein

# "eg eri bóndi"

ÚTOYGGJAFELAGIÐ



Samansett mynd: *Pollamjørki í Stóra Dímun*

**"Í mong ár tosaðu vit um at fara út í Stóru Dímun at ferðast" – sigur Marita Gulklett.**

**Hon og maður hennara, Jens Kjeld Jensen, Nólsoy, fóru í juli mánaði í fjør henda minniliga túrin út í Stóru Dímun, ið Marita her sigur okkum frá.**



*Heygsmaður: Hannur av slagnum Lacanobia oleracea funnin í Stóra Dímun*
*Myndatakari:Jens-Kjeld Jensen*

# "FULLIR" HEYGSMENN FANGAÐIR Í STÓRA DÍMUN



Myndir og tekstur: Marita Gulklett og Jens-Kjeld Jensen.

Í mong ár hava vit tosað um at farið út í Stóru Dímun nakrar dagar at ferðast. Hugflogið hjá Jens-Kjeld hevur somuleiðis verið óavmarkað, tá hann hevur gingið úti í Nólsoy og gitt um, hvørji flogkykt – her serliga firvaldar og heygsmenn, sum møguliga mundu finnast harúti.

Tann 21. juli høvdu Sunnuva og Óla Jákup so pláss at hýsa okkum í 3 dagar. Vit fóru við tyrluni frá Boðanesi, ein lættur, skjótur og góður máti at ferðast.

Veðrið var av tí besta, so alt bendi á, at vit fóru at fáa nakrar góðar dagar har úti.

Vit vóru ikki meira enn lend, so fór Jens-Kjeld í holt við at venda steinum. Hann fann eitt slag av tvístertu, eitt slag av grátt undir steini og so nakrar reivverur, sum seinri vórðu klaktar til ormafirvaldar.

Tá Leif Dahl í fimmtiárunum fangaði firvaldar fyri at kunna skriva ta fyrstu veruligu føroysku bókina um firvaldar, nýtti hann tvinnar hættir til at fanga teir. Antin vórðu teir fangaðir við einum glúpi, ella vórðu teir fangaðir í tí tjúkka sukur/sirupp-lakanum, sum Leif hevði smurt upp á pelar og steinar til at lokka firvaldarnar nærri við.

Fyri umleið 10 árum síðani fingu nøkur klók høvd so tað hugskotið at blanda reyðvín upp í lakan. Ein litur av reyðvíni verður upphitaður saman við tveimum kilo av sukri, og síðani verða sissal-bond løgd niður í lakan. Tá sissal-bondini hava ligið í nakrar mánaðir, og sostatt eru gjøgnumbloytt av lakanum, eru tey klár at heingja upp á hegnpelar og líknandi.

Eg skal viðmerkja, at tað er ikki neyðugt at nýta franskt árgangsvín – bíligt pappvín er fult út líka gott!

Hesi reyðvínsbondini falla so sanniliga í góða jørð hjá mongum firvaldum – og serliga heygsmonnum!

Sum eina roynd havi eg málað ein lítlan prikk á nakrar skreytveingir, meðan teir hava sitið á einum bandi í einum góðum rúsi. Vanliga koma heygsmenn ikki til reyðvíns-bondini, fyrr enn tað er farið at skýma; men teir, sum vóru merktir, komu til bondini fleiri tímar fyri skýming, so skjótt er at detta útí!

Aftur til Stóru Dímun! Vit



Jens-Kjeld heingir bondini upp

høvdu um 75 bond við okkum, sum vit hongdu upp á hegn og pelar tvey kvøld á rað. Tilsamans fangaðu vit 25 heygsmenn, og teir vóru soleiðis býttir: 2 rossafirvaldar, 5 flekkuveingir, 2 sprøkluveingir, 1 veingjagula, 14 roðaveingir og so "kvettið" – ein kall-heygsmann av slagnum *Lacanobia oleracea* (latín), sum ikki er fangaður áður í Føroyum.

Eg veit ikki enn, um hesin heygsmaðurin verpur í Stóra Dímun; men helst er hann flogin higar úr Bretlandi.

Um vit telja tey nýggju firvaldasløgini við, sum vórðu fangaði summarið 2004, eru 130 sløg av firvaldum (Lepidoptera) higartil funnin í Føroyum.

At fanga firvaldar var bert eitt at tí, vit gjørdu í Stóra Dímun. Vit sóu oynna í blikalogn og sól, sirmi og vindi, pollamjørka, mjørka og regni. Sjálvandi var eisini gingið upp á hesa ótrúliga vøkru oyggj, har útsýnið var frítt yvir á Lítlu Dímun, Skúvoy, Sandoy, Suðuroy og nakað av Mykinesi.

Vit vilja at enda takka dímunarfólkunum fyri teirra stóra gestablídni!



# Útoyggjalist





## Listaframsýning á Ólavsøku

Á ólavsøku verður høvi hjá øllum at uppliva list av útoyggj.

Tað eru børn og ung av útoyggj, ið saman við útoyggjafelagnum sýna fram listaverk og kunning frá hvørjari einstakari útoyggj.

Ólavsøkan, ið er eitt forum, har ungdómur hittist til dyst, list og leik, fær í ár eitt listarligt íkast frá børnum og ungum av útoyggj.

Endamálið við listaframsýningini er at skapa kunnleika um útoyggjarnar, kryddað við kreativiteti og hugflogi.

Útoyggjalist